## Modric í ringum lag

Kroatiski stórspælarin Luka Modric, sum spælir fyri enska toppliðið Tottenham, breyt beinið í dystinum ímóti Birmingham leygardagin. Nú skal Modric halda frí í minst seks vikur, og tað kemur illa við hjá spælaranum, sum hevur verið í stórformi í ár.

- Eg kenni tað, sum um alt er dottið saman rundan um meg. Eg eri sera keddur av hesum, og tað ringasta verður at skula verða áskoðari til dystirnar næstu tíðina, sigur Modric.



## Verjuspælari datt á súkklu

Tá FC Midtjylland í gjár spældi ímóti AaB í donsku superliguni, kundi verjuspælarin Danny Califf ikki spæla við hjá FCM. Orsøkin var, at hann hevði verið súkklutúr í farnu viku. Hann datt av súkkluni og fekk ein stoyt í mjødnina og fekk ikki spælt. Brúk hevði kanska verið fyri Califf í verjuni, tí FCM tapti triðja dystin á rað í Aalborg í gjár.

# Níggju sekund á muni

**Súsanna Skylv var bara níggju sekund aftan fyri Gunnar Dahl-Olsen í FM-kappingini í Sprint Triathlon, so tað var um reppið, at hon vann á øllum monnunum, sum vóru við**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen

Tað gjørdist spenningur til tað síðsta, tá sjey ítróttarfólk – ein kvinna og seks menn – kappaðust um føroyameistaraheiti í Sprint Triathlon. Einsamalla kvinnan, Súsanna Skylv, vann sítt meistaraheiti, men tað var um reppið, at hon eisini endaði framman fyri allar menninar, sum vóru við!

Munurin var sera lítil, tí Gunnar Dahl-Olsen vann føroyameistaraheitið hjá monnunum við tíðini ein tími, átta minuttir og 40 sekund, og bara níggju sekund aftan fyri hann kom Súsanna á málið sum føroyameistari hjá kvinnum.

Síðani vóru einir tríggir ella fýra minuttir niður til Andrass Joensen og aftur nakað tað sama niður til Kára Simonsen. Onkur av teimum, sum vóru við í kappingini í gjár, vóru við fyri fyrstu ferð, og onkur royndi aftur, eftir ikki at hava verið við í fleiri ár.

Fyrst svumu tey íðkandi 750 metrar í Svimjihøllini í Gundadali, áðrenn tey súkklaðu 20 kilometrar á teininum millum rundkoyringarnar við Svimjihøllina, Skansan og Hvítanesvegin, og at enda runnu tey 5,5 kilometrar á gøtunum hjá Skógrøktini, har rutan var hálvatriðju ferð runt í eitt áttatal.



**Súsanna Skylv, sum her er í holt við teir 750 metrarnar í svimjihylinum, var bara níggju sekund frá at vinna á øllum monnunum, tá FM í Sprint Triathlon var í gjár**

Mynd: Álvur Haraldsen

# Nólsoyarsvimjingin 2009

**Leygardagin var farið undir Nílsoyarsvimjingina 2009, sum bleiv útsett vegna illveður á Ovastevnu. Fyrireikararnir vildu ikki avlýsa svimjingina, nú svomið hevur verið í 11 ár**

SVIMJING
*2Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Av tí, at svimjingin bleiv útsett í 2 vikur, lá ikki fyri hjá fleiri av tilmeldaðu svimjarunum at koma við.

Veðrið var gott og rákið av tí besta, eitt frálíkt vegur at avgreiða svimjingina.

4 svimjarar bjóðaðu seg til túrin. Teir hava í eina tíð svomið í Sandagerði og fyreireikað seg til tiltakið m.a. hava teir lært seg at svimja aftan á báti og eftir ýtum á landi. Eisini hava teir nakrar ferðir verið í Hósvík og svomið.

Róðrarfelagið var so beinasamt, at bjóða svimjarunum neystið at skifta í. Ta einu ferðina svumu teir yvir á Veðranes og aftur, ein túrir upp á uml. 2,5 km.

Klokkan 12.30 løgdu svimjararnir á fjørðin, og skjótt sást, at teir, ið oftast høvdu verið á sjónum drógu frá. Rói í Dali og Hans Egholm løgdu seg í oddin, við beinari kós móti málinum. Kári Simonsen og Erlendur Simonsen, sum hava svomið teinin fleiri ferðir, valdu sínar egnu leiðir. Annar fór suðurá hin norðurá.

Komnir nakað útfrá, sást at Rói var fremstur. Og hildið var eisini, at Hans fór at blíva nummar tvey, men komnir undir Nólsoyarlandið, spældi rákið svimjarunum eitt puss. Báðir komu móti landi á suðursíðuni á brimgarðinum. Meðan hetta hendir, er Erlendur, sum er tann royndasti svimjarin, á veg norðaliga, og við einari beinari kós norðanfyri bygdina kom hann á mál sum nummar tvey, meðan Hans kom undir kirkjuni. Kári, sum er hann, ið hevur vant minst, valdi trygdina, og fór tí rímiliga langt suðureftir, fyri at tryggja sær at koma beint á víkina. Hetta eydnaðist og hann kom á mál sum nummar fýra.

Tíðirnar vóru:

1. Rói í Dali 1 tíma 26 min 05 sek
2. Erlendur Simonsen 1 tíma 29 min 53 sek
3. Hans Egholm 1 tíma 34 min 51 sek
4. Kári Simonsen 1 tíma 48 min 11 sek

## Bestubitar úr 3. hálvleiki

»Heri um eitt àvìst felag rykkjur nidur ì àr, verdur 3. Hàlvleikur so eisini leygardag nærta àrB-)«

»Eg haldi KÍ'arnir nú skullu fara at drekka AB mjólk.:-)«

»Mis eydna "Mohr-roynd" i klaksvìk: Ki eru so desperatir at nu royna teir eina "mohr" roynd«

»Ein sera góður dystur á Toftun í dag. Al Keita var explosivur, koyr á B68 ein HH fan.«

»ìF-verjan var so opin og innbjòdandi, at B68 kundi gott sett bùfòlkid à ellisheiminum at spasera ì gjøgnum vid bòltinum. Hatta mà betrast til Kì-dystin«

»Tad einasta kì fer at vinna ì àr er sakarmàlid mòti tony paris....,....«

»à Argjum seinasta sunnudag irriteradist eg ìnnà mjørkan. ì dag saknadi eg hann à Svangaskari!«

» 07 Vestur
roynist mestur
sum botnur bestur.
Tí verdur brestur,
tá B36 mid og KÍ eystur
fara á fallid vestur!«